## Reiðarí rinda rannsóknir

Politikararnir eiga ikki at krevja tilfeingisgjald frá reiðaríunum, tí tað fer ikki at gagna nøkrum í vinnuni, heldur formaðurin í grønlendsku fyritøkuni Polar Seafood, Kjeld Holmstrup. Ístaðin mælir hann til eina skipan, har reiðaríini rinda part av útreiðslunum til fiskirannsóknir. Hugskotið fær góða móttøku á Náttúrustovninum, sum stendur fyri fiskirannsóknunum í Grønlandi, sum tó leggur dent á, at kanningarnar mugu framvegis verða óheftar.



*Polar Seafood er sinnað at rinda fyri fiskirannsóknir í Grønlandi (Mynd: Vísir)*

# Nógv áhugavert at síggja




*Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi hevur bæði beinini á jørðini, nú borað verður í óvissuni fleiri túsund metrar niðri í føroysku undirgrundini*

**Bæði føroyskir jarðfrøðingar og oljufeløgini eru samd um, at tað á føroyska landgrunninum er nógv eftir, sum er áhugavert at kanna. Tað eru t.d. nógvir stórir strukturar, sum kunnu vera oljugoymslir, hóast tað ikki nýtist at vera so. At pakka saman við tað fyrsta rokni eg als ikki við, at oljufeløgini gera, hóast einki rakstrarverdugt oljufund er gjørt enn. Tað fara í hvussu er at ganga mong ár, áðrenn oljufeløgini geva skarvin yvir segði Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi í samrøðu við útvarpsrásina Rás2 herfyri**

LANDGRUNNURIN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Vit hava her ein samandrátt av samrøðuni, sum Eyðun Klakstein hevði á Rás2 við ovasta leiðaran fyri oljuleiting á føroyska økinum, Petur Joensen.

- Vit hava havt tvey útbjóðingarumfør og latið 14 loyvi. Av teimum eru trý latin inn aftur, og tí eru 11 loyvi virkin í løtuni. Umleið 13 feløg eru við í leitingini. Boraðir eru fimm brunnar umframt tann, sum verður boraður í løtuni. Komandi ár verður eftir øllum at døma ein brunnur boraður aftrat, og ábendingar eru um enn ein brunn í komandi ári, tó at vit ikki hava fingið nakað at vita um hann enn. Tað er tí týdningarmikið at staðfesta, at gongd er í málinum, at grýtan er í kók sigur Petur Joensen og heldur fram:

### Gullhornið ikki gull vert

- Loyvini, sum eru latin innaftur, liggja í sokallað Gullhorninum, sum tíverri ikki gjørdist gull vert. Feløgini her eru ikki hugað at hava hesi loyvini longur, og frá myndugleikanna síðu er man ikki áhugaður í, at feløgini bara liggja við hesum loyvunum og einki gera við tey. Tí verða tey latin innaftur og eru til taks fyri onnur feløg, um nakar áhugi er fyri teimum í framtíðini.

Oljuleiting er ein langsiktað prosess, og tí halda vit ikki, at vánaligu úrslitini í Gullhorninum hava ávirkað so nógv. Í tí løtu tá staðfest verður, at eingin olja er, har borað verður, so vil tað altíð vera eitt vónbrot og psykologiskt eitt niðurlag, men uppá langt sikt halda vit ikki, at tað hevur verið avgerandi.

### Kolvetnisskipan staðfest

Uppá fyrispurning hvat tað mest týðandi hevur verið í oljuleitingini sigur Petur Joensen, at mangir eru leikirnir í einum longum talvi, og oljuleiting er ein drúgv prosess. Tað verður lagt aftrat í smáum stigum fyri tað mesta. Men er tað nakað, sum man kann siga er týdningarmikið, so er tað, at vit fingu staðfest eina virkna kolvetnisskipan, at olja verður framleidd í okkara undirgrund, tá fyrstu brunnarnir vórðu boraðir. Tað var ikki nøkur sjálvfylgja, og var tí sera umráð-